## Endabrestur í íløguspælinum

Í kvøld verða virðislønirnar í stóra Íløguspælinum lætnar í Miðlahúsinum. Tróndur Enni og Niel Joensen hugna um við tónleikiEik Banki og Sosialurin skipa fyri, at vinnararnir í Íløguspælinum verða kosnir, og virðislønir verða handaðar í Miðlahúsinum í kvøld. Tá verður kunngjørt, hvør hevði nervarnar og evnini at vinna Íløgusælið. Hvør dugdi at halda høvdið kalt og støðugt gera bestu íløgurnar farnu fýra mánaðirnar? Besti íleggjarin vinnur heilar 50.000 krónur, meðan næstbesti og triðbesti íleggjarin fær ávikavist 25.000 og 10.000 krónur. Kom oman í Miðlahúsið í kvøld. Tað verður eitt hugnaligt kvøld við spannandi framløgum, leskiligum sjálvtøkuborði og tónleiki við Tróndi Enni og Niel Joensen

## Dollarin minni enn fimm krónur

Amerikanski dollarin er nú minni enn fimm krónur verdur, og so lítið hevur virðið ikki verið í næstan 30 ár Tað er fyrst og fremst bústaðarkreppan í amerikanska búskapinum og útlitini fyri nýggjum rentulækkingum, sum trýsta dollaran í botn. Bústaðarkreppan fær nógva umrøðu í USA, og í gjár søgdu bæði Hillary Clinton og Barrack Obama, at tey eru til reiðar við tiltøkum fyri at venda gongdini, verða tey vald. Dollarin er nú so veikur, sum hann ikki hevur verið síðani seinast í sjeytiárunum ella næstan 30 ár

# Mentafólk fremja politiskt álop

**Mentamálaráðharrin hevur illgruna um, at neyðarrópið frá fýra mentafólkum í farnu viku meir er ætlað sum eitt politiskt álop á seg**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni øtast yvir ósakligu grundgevingarnar hjá ávísum mentafólkum í seinastuni*

Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, hevur ilt við at taka neyðarrópini frá fýra mentafólkum her í blaðnum í farnu viku í álvara.

- Eg eri bangin fyri, at hetta sokallaða neyðarrópið meir er ætlað sum eitt politiskt álop. Í øllum førum virkar tað sera illgrunasamt at koma við slíkum ósakligum páhaldum beint upp undir val, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Á tremur við fordómum

Spurdur, júst hvørji páhald, hann sipar til, sigur Jógvan á Lakjuni, at tað serliga eru útsøgnirnar hjá Arnbirni Dalsgarð, formanni í Rithøvundafelagnum, og Carl Jóhan Jensen, rithøvundi, hann fýlist á.

- Faktiskt er alt, sum Arnbjørn Dalsgarð sigur, fullkomiliga ósakligt og á tremur við fordómum. Tá hann sigur, at eg aldrin átti at sloppi at verið landsstýrismaður, minnir tað á óhugnaligan hátt um okkurt slag av berufsverbot, sigur Jógvan á Lakjuni.

Eisini øtast hann yvir ákæruna hjá Arnbjørn Dalsgarð, har hesin vil vera við, at mentamálaráðharrin vil køva alla mentan og list.

- Hatta er so mikið álvarsamt, at eg haldi, at Arnbjørn heldur átti at vent sær beinleiðis til mín við tí, sigur mentamálaráðharrin.

Sambært Jógvani á Lakjuni eru útsøgnirnar hjá Carl Jóhan Jensen, um, at mentamálaráðharrin skýggjar allar ósemjur, líka langt úti. Kortini nerva hesar útsøgnir ikki mentamálaráðharran stórvegis, tí sum hann sigur

- Eg havi ongantíð hoyrt Carl Jóhan Jensen rósað nøkrum øðrum enn sær sjálvum, so hansara atfinningum eri eg ikki so kløkkur av.

### Ver tolin

Sambært mentamálaráðharranum vísa Jenny C. Petersen, stjóri á Tjóðpalli Føroya, og Rói Patursson, formaður í Mentanargrunninum, hinvegin, at tað ber til at vera ónøgdur uttan at koma við ósaklium álopum.

- Eg eri samdur við Róa Patursson í, at Mentanargrunnurin átti at fingið munandi meir pengar at arbeitt við. Játtanin til grunnin er hækkað nakað seinastu árin, men eg eri fullgreiður yvir, at hon ikki er nóg høg, sigur mentamálaráðharrin, sum kortini ikki kann lova grunninum nakran munandi bata í bræði.

- Øll rópa upp um pengar, men landið hevur also ikki óavmarkaðtal av milliardum at býta út. Játtanir eru altíð ein spurningur um raðfesting - tað fær ikki verið øðrvísi, minnir mentamálaráðharrin á.

Spurdur, hví eitt nú Tjóðpallur Føroya er raðfestur so lágt, at hann ikki so frægt sum hevur eitt veruligt høli at húsast í, sigur Jógvan á Lakjuni, at eisni tey mugu vera tolin, eins og øll onnur, sum bíða eftur pengum.

- Vit hava eina lóg um Tjóðpall Føroya, og sjálvandi skal hon fylgjast upp. Eg vænti, at játtanin til Tjóðpallin fer at kvinkast uppeftir, men nær tað verður, fái eg ikki sagt beint nú, viðgongur Jógvan á Lakjuni.

Hann fær heldur ikki sagt, hvat hann heldur um uppskotið um, at listafólk fáa okkurt slag av minstuløn.

- Eg dugi væl at skilja, at teirra arbeiðsumstøður ofta eru ótryggar. Tað kann gott vera, at man átti at hugt nærri at einum slíkum uppskoti. Hinvegin verður tað neyvan lætt at blíva samdur um, júst hvørji listafólk skulu verða partur av eini slíkar skipan, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Mentanarpolitikkur er so nógv

Mentamáláráðdharrin skilur annars ikki ákæruna um, hann ikki megnar at orða ein veruligan mentanarpolitikk.

- Vit hava júst fingið eitt málálit við eini røð av tilmælum um, hvussu vit best stimbra føroyska málið. Er tað ikki mentanarpolitikkur? Eg havi skotið upp at Føroya Symfoniorkestur skal á fíggjarlógina, at stimbra sangin í skúlanum o.s.fr. Eftir mínum tykki er slíkt eisini eitt slag av mentanarpolitikki, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann leggur afturat, at meðan tað er lætt at grenja um tey mentanarøki, sum tørva pening, er tað skjótt at gloyma teir batar, sum hóast alt eru hendir.

Hann nevnir, at játtanin til bókasøvn umframt onnur søvn er hækkað munandi, játtanin til leiklist sum heild er økt við 700.000 krónum, meðan LISA júst hevur fingið einar 80.000 meir at arbeiða við.

- Faktisk er tað hend ein rúgva á mentanarøkinum seinnu árini – ikki minst úti á bygd, har mentanarlívið blómar. Men slíkt varnast tey sjáldan í Havn, sigur mentamálaráðharrin.

# Fýra íkast til kjak hesa vikuna

TÍÐARGREINAR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Hesa vikuna vera fýra tíðargreinar í Sosialinum. Í dag hugleiðir formaðurin í Rithøvundafelagnum um mentarnarpolitiska kjakið og ræðsluna fyri frælsari list, í morgin gevur stjórin í Granskingarráðnum sítt íkast til kjakið um týdningin av føroyskari gransking. Mikudagin er tíðargreinin skrivað av stjóranum í Suðuroyar Sparikassa, um hvussu lítið vit vita um føroyska búskapin, og hósdagin er tað aftur mentannarpolitikur, sum er til viðgerðar. Hesaferð rithøvundurin, Rakel Helmsdal, ið hugleiðir

**Rætting:**

Prísurin fyri frælsi - Tolsemi fyri ótolsemi er dirvisloysi

Av misgávum manglaðu seinastu orðini í tíðargreinini hjá Agga Niclasen um Ayaan Hirsi Ali, sum stóð í blaðnum hósdagin, 10. januar

Tíðargreinin snúði seg um somaliska tilflytaran í Hollandi, sum við stórum dirvi og hegni hevur funnist at kvinnukúganini í muslimsku mentanini.

Endin á tíðargreinini skuldi vera soljóðandi:

Hirsi Ali bað í november um lívverju í eina viku— bara so at hon trygt kundi skaffa figging til at fáa egnar lívverjar. Men hollendska stjórnin vildi ikki so mikið sum heimila henni hetta náðiliga ynski.

Hetta merkir, at ábyrgdin er havnað hjá okkum. Og lukkutíð eru einstaklingar, ið ikki kunna góðtaka, at Aayan Hirsi Ali onga lívverju hevur. Við privatum intiativi frá so mætum monnum sum Salman Rushdie og Christopher Hitchens er ein innsavnan farin í gongd at tryggja, at hesum intellektuella bundi, hesum muslimanna svari uppá Luther, er lív lagað.



*Arnbjørn Ó. Dalsgarð, formaður í Rithøvundafelagnum, skrivar í dag millum annað um politisku ræðsluna fyri frælsari list*



*Annikað Sølvará, stjóri á Granskingarráðnum, skrivar tíðargreinina í morgin: Nógv egg í fleiri kurvar*



*Mikudagin eigur Søren Bruhn, stjóri á Suðuroyðar Sparikassa, tíðargreinina: Eru vit komin á eggina?*



*Rakel Helmsdal viðger hósdagin mentanarpolitikkin hjá einum ávísum flokki: Alt sum elskuligt er*